# Vit bera okkum at sum svín ímóti ú

**Johan Dahl, løgtingsmaður, sigur, at klárar løgmaður ikki at fáa skil á, má útlendingamálið leggjast fyri samgonguna. Vit kunnu ikki bera okkum at sum svín ímóti útlendingunum, sigur hann**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit bera okkum at sum svín ímóti útlendingum og her má vend koma í.

Tað er ítøkiliga staðfestingini hjá Johan Dahl, løgtingsmanni.

Tí krevur hann, at landsstýrið tekur annað



*– Føroyskur útlendingapolitikkur ber brá av rasismu og tí er tað ein stórur trupulleiki fyri alla samgonguna, sigur Johan Dahl, løgtingsmaður, sum hevur reist málið í Løgtinginum*

skinn um bak og fær ein útlendingapolitikk, sum er virðiligari fyri Føroyar enn tað, sum nú fer fram.

Seinastu dagarnar er rættiligur eldur komin í útlendingamálið, eftir at sjónvarpið visti at siga, at eini hjún, sum hava búð í Sørvági í fleiri ár, nú verða send av landinum.

Hetta fekk Johan Dahl, løgtingsmann, at reisa málið í tinginum í gjár og tað førdi til eitt orðaskifti, sum førdi bæði til so sterk orð og so sterkar kenslur.

### Ein trupulleiki fyri alla samgonguna

Johan Dahl sigur, at útlendingamálið er nú so eldfimt, at tað er blivið ein rættiligur trupulleiki fyri innlendismálaráðið, men sanniliga eisini fyri løgmann.

– Og klárar løgmaður ikki at loysa trupulleikan, má útlendingamálið leggjast fyri samgongonguna, so hon kann sleppa at stinga út í kortið, hvussu farast skal fram ímóti útlendingunum í Føroyum.

Johan Dahl stúrir fyri, at tað er ikki rætt, at fólkaflokkurin umsitur útlendingamálið, tí júst fólkaflokkurin hevur gjørt útlendingar til ein trupulleika.

Hann stúrir eisini fyri, at tað er hesin hugburður mótvegis útlendingum, sum speglast aftur í teirri viðferð, teir fáa.

– Men er tað embætisfólkið í innlendismálaráðnum, sum er trupulleikin, skulu tey takast av málinum, tí tað, sum nú fer fram, kann undir ongum umstøðum góðtakast.

Johan Dahl sigur, hann hevur fingið staðfest, at danska stjórnin hevur vissa føroyingar um, at vit fáa útlendingamálini avgreidd

---

# Ein tikkandi bumba undir føroyska s

**Í hvørjum einasta flokki á løgtingi verður útlendingapolitikkurin hjá landsst‡rinum sáplaður niður og tinglimir úr samgonguni eru serliga hvassorðaðir**

ÚTLENDINGA-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Ein tikkandi bumba. Stór vanærilig skomm. Ein skammblettur fyri Føroyar.

Hetta er skoðsmálið, sum útlendingapolitikkurin hjá landsstýrinum fær frá øllum flokkum á Løgtingi. Mikudagin umrøddi løgtingið útlendingapolitikkin og har vóru ikki minst tinglimir úr samgonguni hvassorðaðir.

Vit hava tikið ein samandrátt av orðaskiftinum.

John Johannesen vildi hava at vita, hvat er hent í innlendismálaráðnum. Hann vildi hava at vita um umsitingin í innlendismálaráðnum hevði fingið politisk harraboð til at senda úlendingar av landinum, ella um talan var um politiskan hugburður, ella væntandi umsitingarliga orku.

Hann vísti eisini, at danir hava boðað frá, at teir fylgja tilmælum í Føroyum.

Bill Justinussen sigur, at danska stjørnin hevur boðað heilt greitt frá, at føroyingar fáa útlendingamálini avgreidd sum vit sjálvir vilja og tí ber ikki til at geva dømum skyldina. Nýggi landsstýrismaðurin hevur tí ein einastandandi møguleika at geva teimum útlendingum, sum longu eru her, frið at liva.

Olav Enemoto minti á, at upgávan hjá løgtinginum er eisini at røkja áhugamálini hjá arbeiðsleysum føroyingum og ikki bara hjá útlendingum í Føriyuum.

Jørgen Niclasen staðfesti, at tað er bara eitt at gera og tað er at yvirtaka málsøkið so at vit fáa eina lóg sum samsvarar við politiska viljan í Føroyum. Í løtuni er lógin donsk og tí er tað ein danskur myndugleiki, sum tekur avgerðir og vit hava mangan staðfest, at avgerðirnar eru ikki í samsvari í politiska viljan í Føroyum.

Hergeir Nielsen harmaðist um at avtalan, sum Høgni Hoydal fekk í lag, ikki varðsett í verk, tí so høvdu vit havt eina virðiliga umsiting á økinum

Marjus Dam helt, at talan var um ein rættiliga stórur trupulleiki, bæði hjá løgtingi og í samgongu. Talan er um fólk, sum hava gjørt eitt stórt arbeiða her á landi og vit skylda teimum eina virðiliga viðferð, men tað fáa tey ikki. Tað er skeivt at geva dønum skyldina, tí teir hava boðað frá, at vit fáa tað sum vit vilja hava tað á útlendingaøkinum.

Heidi Petersen vildi hava at vita, nær samgongan ætlaði at loysa útlendingamálið, tí nú vóru tvey ár gingin, uttan at nakað hendi. Einasti møguleiki at fáa eina loysn, sum vit kunnu góðtaka, er at yvirtaka málsøkið.

Kaj Leo Johannesen helt, at tað, sum hendir í útlendingamálinum er ein skammblettur, bæði fyri samgonguna og fyri sambandsflokkin, fólkaflokkin og javnaðarflokkin. Hann vildi tí hava tað nágreiniliga útgreinað, hvat hendi, tá ið hjúnini í Sørvági vórðu víst av landinum, so navn kundi setast á tann ella tey, sum hava skyldina. Sjálvur helt hann, at ongin hevur skyldina, uttan samgongan sjálv.

Annita á Fríðriksmørk harmaðist um, at skilagóð fólk verða útflutt. Her er talan um fólk, sum hava lagt nógv gott eftir seg í Føroyum og sum fegin vilja vera verandi her.Tí er ongin orsøk at senda tey av landinum. Vit hava heldur onga trupulleikar av innflytarum, kanska hava vit tvørturímóti ov fáar útlendingar her, so vit eiga at hjúkla um teir, sum eru her.

Finnur Helmsdal vildi hava at vita um nýggi landsstýrismaðurin ætlaði at halda fram eftir somu leið sum undanmaður hansara. Hann hugsaði serliga um teir útlendingar, sum longu er her, sum hava tillagað seg føroyska samfelagið og sum eru fult intigrerað í føroyska samfelagnum. Tað er ímóti allari nýmótans hugsan at senda slík fólk av landinum.

Kári P.Højgaard helt ikki at nakar á Føroya Løgtingi kann liva við støðuni, sum



hon er nú. Fleiri útlendingar í Føroyum hava tænt føroyska samfelagnum væl og nógv eiga bæði hús og heim her, men tey ganga í støðugum ótta fyri at send av landinum. Tað er ikki nøktandi og hetta taka vit als ikki undir við.

Kristian Magnussen helt, at tað, sum fer fram í Føroyum í dag, er stór, vanærilig skomm. Onki folk ferðast so nógv í onnur lond at arbeiða, sum júst føroyingar og tað er at skammast yvir at vit skulu bera okkum at ímóti teimum, sum koma til okkara.

Gerhard Lognberg staðfesti, at føroyingar hava verið væl móttiknir, har teir hava verið og arbeitt. Hann helt, at fólk, sum hava verið í Føroyum í nógv ár og eiga hús her, eiga at sleppa at verða verandi. Hann ávaraði kortini ímóti at geva heilt leyst, men tey, sum hava sett seg niður her, eiga at verða viðfarin sum føroyingar.

Alfred Olsen segði, at øll, sum eru í Føroyum, eiga at fáa eina virðiliga viðgerð, men tað, sum er farið fram, er óvirðligt. Hann sigur, at tað ber ikki til at geva dønum skyldina, tí vit hava fingið at vita, at umsóknir liggja í innlendismálaráðnum í mánaðir og ár og tá er spurningurin um rættartrygdin er í ordan.

Tórbjørn Jacobsen staðfesti, at talan er ikki um eitt føroyskt málsøki og tí eru tað danir, sum hava ábyrgdina av málsøkinum Men er ætlanin at yvirtaka málsøkið, er tjóðveldisflokkurin altíð klárur.

Jóhan Dahl fegnast um at semja er í løgtinginum um, at støðan er ikki nøktandi, hóast málið ikki verður umsitið hareftir. Tað, sum fer fram nú,